# TILTØK

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 23. februar***
Vit fara heim til Kristinu at fáa drekka og føstulávintsbollar
***Mikudagin 25. feburar***
3. brot úr Lognbrá eftir Heðin Brú verður lisin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 23. februar***
Tunnusláttur.
Drekkamuður v/ føstulávintsbollum. Vit fara upp á gólv.
***Týsdagin 24. februar***
Drekkamuður
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 25. februar***
Maria og Morid siga frá hvussu tað er at vera næmingur á Húsarhaldsskúla Føroya. Tær vísa fram handaligt arbeiði, og gera ein góðan drekkamunn
***Hósdagin 26. februar***
Drekkamuður
Prát og sangur
***Fríggjadagin 27. februar***
Opið hús
Drekkamuður

*Andakt er hvønn dag – bløðini eru altíð til taks í Fløvanum*

**Eldrafelagið Nón, Saltangará**
Vit koma saman í húsum felagsins í Torvgøtu 2 til pottasláing føstulávintsmánakvøld kl. 19.30.
Týskvøldið verður hugnaløta í Hæddini, Jónsvein og Birgir undirhalda. Lutaseðlar verða seldir. Nýggir limir eru vælkomnir.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237.
www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597,
fartlf. 222381,
skrivitlf. 316929 · fax 313609
og teldupostadr.: deaf_deaf.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839
faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 3. apríl kl. 13.30 giftast í Betesda Olanta Højsted Isaksen og Eskild Norðbúð, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður í Betesda kl. 18.30. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 456515 ella 251375 innan 13. mars. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 13. mars giftast Marit Hilmarsdóttir Jensen av Sandi og Fríðfinn Nicolajsen úr Skopun. Vígslan verður í Sands kirkju kl. 16.00. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, vera biðin um at siga frá innan 1. mars á tlf. 361312, 361694, 361532 ella 361191.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 24. februar kunnu Cecilie og Jonhard K. Poulsen, Kalissip Aqq 1, 3950 Aasiaat, Grønland – hátíðarhalda teirra 25 ára brúdleypsdag.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

### Om bøn.

*Salme 20,5-6: Måtte han give dig, hvad dit hjerte ønsker, og lade alle dine planer lykkes. Da vil vi juble over din frelse, og løfte banneret i Vor Guds navn.*

Vi har ved dåben fået en nådegave så stor. Som vi læser i ovennævnte Davids-salme, så jubler den, som er frelst, og som får alt, hvad hjertet ønsker, og alle hjertets planer lykkes. Det er et kolossalt privilegium for kristne at kunne bede til Gud og få.

Vi læser og hører i dåbsbefalingen, at vi skal holde alle Jesu befalinger. Men Jesus gik jo ikke sådan rundt og dikterede befalinger, han var ikke befalingsmand. Jesu attitude var kærlighed, mildhed, godhed, barmhjertighed o.s.v. Men hans befalinger lød blandt andet med følgende imperativer: »Bed, så skal der gives jer...« (Matth. 7,7), »...Bed og I skal få, så jeres glæde kan være fuldkommen« (Johs. 16,24b), »Giv den der beder dig, og vend ikke ryggen til den, der vil låne af dig« (Matth. 5,42), »Derfor skal I bede således... (Fadervor)« (Matth. 6,9-13), »elsk jeres næste...« (Matth. 22,39) o.s.v.

Jesu befalinger til os kan siges med et ord »kærlighed«. »Elsk jeres næste…« stammer fra en beretning, hvor en lovkyndig farisæer spurgte Jesus, hvad det største bud i loven var, hvortil Jesus lige så godt kunne have sagt ordet »kærlighed«. Men Jesus svarede: »Du skal elske Herren din Gud af hele dit hjerte og af hele din sjæl og af hele dit sind« og »Du skal elske din næste som dig selv. På de to bud hviler hele loven og profeterne.« Loven er ganske enkelt at elske Gud og elske sin næste som sig selv.

Så enkelt er det. Når vi elsker vore medmennesker og gør godt imod alle, så gør vi ret. Når vi lader os fylde af hans ord, så får vi tro, for troen kommer af det, som høres.

Jesus taler om sig selv som et vintræ, og i denne forbindelse, sammenligner han os med grene, der skal bære frugt. Hvis ikke vi bærer frugt, så kastes vi bort som brænde, der kastes i ilden. Jesus taler også om, at hans ord skal være i os (Johs. 15,7). Det er Jesu enkle og dejlige befalinger – alt læse og høre hans ord.

Der er knyttet store forjættelser hertil.

Johs. 3,16: For således elskede Gud verden, at han gav sin enbårne søn, for at enhver, som tror på ham, ikke skal fortabes, men have evigt liv.

**Mogens Tilsted Christensen, sognepræst**

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 21. februar Gøta tlf. 44 10 86
Sunnudagin 22. februar Skála tlf. 44 14 90

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.



# Samanleggingin er nú ein veruleiki

**– Oyndarfjørður verður altíð Oyndarfjørður, segði bygdarráðsformaðurin, Árni Joensen, tá ið Sosialurin tosaði við hann undan fólkaatkvøðunum í Oyndarfirði í fjør heyst. Nú er endaligi sáttmálin um samanlegging millum Oyndarfjarðar kommunu, Skála kommunu og Runavíkar kommunu undirskrivaður**

UNDIRSKRIVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


*Sáttmálin verður undirskrivaður og teir tríggir, Kári Johannesen, Árni Joensen og Rodmundur Nielsen fegnast um samstarvið, sum nú er sett á »skinnaran«*
*Mynd: Maria Olsen*

Hóskvøldið klokkan 19.30 var samkoma í býráðshøllini í Saltangará í samband við, at endaligi sáttmálin um samanlegging av teimum trimum kommununum, Oyndarfjarðar kommunu, Skála kommunu og Runavíkar kommunu, varð undirskrivaður. Væl av fólki var til móttøkuna, har ímillum eisini løgmaður, Jóannes Ejdesgaard og landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu umframt onnur umboðandi landsumsitingina. Bý-og bygdarráðslimir úr teimum trimum kommununum vóru eisini hjástaddir, tá ið undirskrivingin fór fram. Seinni um kvøldið var hátíðarhald í Róðrarneystinum á Glyvrum.

Sambært sáttmálanum, verða hesar tríggjar kommunurnar lagdar saman í eina kommunu frá 1. januar 2005 at rokna, men longu nú er og verður tætt samstarv millum kommunurnar á øllum økjum.

Við verandi fólkatali í huga, verður samlaða fólkatalið í samanløgdu kommununum stívliga 3.500 við ársbyrjan 2005.

### Á skinnaran

Tað eru sløk hálvt triðja ár, síðan Skála kommuna og Runavíkar kommuna undirskrivaðu sáttmála um samanlegging, og uppundir ársenda í fjør atkvøddu oyndfirðingar seg eisini inn í Runavíkar kommunu. Møguleikarnir hjá oyndfirðingum vóru tvinnir, Runavíkar kommuna ella Fuglafjarðar kommuna, sum hevur mark við Oyndarfjarðar kommunu. Valið fall á Runavíkar kommunu.

Undir samkomuni, segði Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, at nú er ikki at helma í, men seta ferðina upp, so rætti leisturin á øllum økjum verður funnin.

– Nú er at seta hetta samstarv á skinnaran, soleiðis viðurskiftini í samanløgdu kommununum kunnu forma seg á bestan hátt, segði hann.

Kári Johannesen, bygdarráðsformaður á Skála, segði seg hava stórar vónir til hesa samanlegging.

– Verður samstarvið frameftir líka gott, sum tað hevur verið higartil, vænti eg, at vit saman fara at fáa tað besta burtur úr.

Hann ivaðist ikki í, at samstarvið verður minst líka so gott, nú Oyndarfjørður eisini er við.

Bygdarráðsformaðurin í Oyndarfirði segði seg vera bilsnan av, at tað hevur eydnast hesum trimum kommununum at finna breiðar semjur so skjótt.

Hann helt, at góð fyrireiking er orsøkin til, at tað hevur gingið so væl at leggja hesar tríggjar kommunurnar saman.

– Hetta er ein skræddaraseymaður leistur, ið saktans kann brúkast av øðrum kommunum, sum hugsa um samanlegging, segði Árni Joensen.

Allar tríggjar kommunurnar eru samdar um, at fyrireikingararbeiði til samanleggingina hevur verið stak væl.


*Jóannes Ejdesgaard, løgmaður og Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, vóru báðir hjástaddir*
*Mynd: Maria Olsen*

### Nærri borgarunum

Orsøkin til, at kommunur nú í størri mun enn áður tosa um samanlegging, er í fyrsta lagi stóru uppgávurnar, sum landið leggur út til kommunurnar at umsita.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, segði, at endamálið við at leggja uppgávur út til kommunurnar, er at fáa tænastuna nærri borgarunum.

– Endamálið er ikki at spara landskassanum pening, segði hann.


*Væl av fólki var samankomið í býráðshøllini í Saltangará at vera hjástødd, tá ið endaligi sáttmálin millum tær tríggjar kommunurnar varð undirskrivaður hóskvøldið*
*Mynd: Maria Olsen*


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**



Leygardagin 21.02. kl. $19^{00}$
Leygardagin 21.02. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 22.02. kl. $20^{30}$



Leygardagin 21.02. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $22^{30}$



**Billettprísur: 45,- kr.**
Leygardagin 21.02. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $16^{30}$



**Billettprísur: 65,- kr.**
Leygardagin 21.02. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $17^{30}$



**Billettprísur: 75,- kr.**
Leygardagin 21.02. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $19^{30}$



Leygardagin 21.02. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 22.02. kl. $22^{45}$